# Vlada sleit hælsinuna

**Tað tykist av álvara at tynnast í hópinum hjá Skála, nú topdysturin móti HB stendur fyri framman**

SKÁLA
*Jákup Mørk*

Tað vóru farnir 65 minuttir av dystinum sunnudagin, tá Skála var fyri álvarsligum missi. Vandi tóktist ikki vera á ferð, tá stinni málverjin hjá oddaliðnum, Vlada Filipovic, skuldi fara út eftir einum bólti, sum klaksvíkingarnir høvdu stungið nakað langt fram.

Men brádliga lá stóri málverjin skerflatur. Tekini boðaðu greitt frá, at okkurt álvarsligt var áfatt, og soleiðis var eisini. Hælsinan var slitin, og tað merkir, at Skála má vera ein av sínum mest týðandi monnum fyriuttan, nú seinastu fimm dystirnir á árinum skulu spælast.

Hinvegin hevur Skála ein eykamálverja, sum ikki er heilt sørur. Eugen Voda er kanska ikki heilt ungur longur, men hann hevur í øllum førum royndirnar, sum skulu til, og so má Skála bíða og síggja, hvørt hetta er nóg mikið.

## Fleiri fráverur

Og sum um hetta ikki var nóg mikið, so er í aðrar mátar eisini farið at tynnast út í hópinum hjá Skála.

Einans fimm minuttir eftir, at liðið hevði mist málverjan, noyddist Bjarni Jørgensen at fara av vøllinum. Eyðsæð var, at talan var um vøddaskaða, og hesin kann væl halda honum burtur frá fótbóltinum komandi tríggjar vikurnar.

Hartil er Arnhold Berg enn ikki komin heilt fyri seg eftir krossbandsskaðan, sum hann fekk tíðliga í ár. Enn tykist knæið vera nakað óstøðugt, og í vikuni skal hann aftur kannast av serfrøðingini, sum skal gera av, hvørt neyðugt verður við skurðviðgerð, ella um talan bara skal verða um enn meira venjingar.

Eisini er væntandi, at nakrir spælarar vera burturfrá, nú hondbólturin av álvara er byrjaður aftur. Í øllum førum tykist víst, at Sveinur Justinussen fer við StíF á venjingarlegu í Danmark. Pauli G. Hansen og Alexandur Johansen hava eisini verið fastir fúsir á hondbóltsliðnum, men tað er tó væl hugsandi, at teir kortini vera eftir á Skála, tá StÍF fer av landinum.

Og endaliga, so kann eisini nevnast, at Bárður Danielsen ikki longur er við í hópinum hjá Skála.




*Stinni málverjin hjá Skála, Vlada Filipovic, sleit hælsinuna í dystinum móti KÍ, og verður tí ikki á liðnum restina av kappingarárinum*

KÍ-Skála 0-0:

# Hart KÍ-arbeiði steðga

**Við knallhørðum arbeiði og einum disciplineraðum innsatsi eydnaðist KÍ at steðga vælsmurdu Skála-maskinuni. Og heimamennninir vóru enntá nærri sigrinum enn gestirnir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



Var hepnið við oddaliðnum, soleiðis sum tað oftani er, so kundi Skála enn einaferð farið avstað við øllum í evstu løtu. Í seinastu sekundunum av teimum fimm minuttunum, sum dómarin hevði lagt afturat tíðini, varð innskifti Alexandur Johansen feldur í gjøgnumbrotsroynd á brotsteigarmarkinum. Slík fríspørk plaga at liggja væl fyri hjá Skála, sum hevur upp til fleiri serfrøðingar á økinum.

Men hesa ferð vóru marginalarnir ikki við oddaliðnum. Bólturin brast í múrin, og tá dómarin beint eftir bríkslaði dystin av, var stigamissurin vísur.

## Óneyv innlegg

Hevði Skála soleiðis tikið stigið í evstu løtu, so hevði tað mest sum verið ov mikið fyri klaksvíkingarnar kring vøllin - sum enntá tóktust vera í undirtali mótvegis væl mannaða Skála-kórinum.

Tí fyri tað heilt nógva var ilt at síggja - ella fata - at KÍ í ár er eitt av botnliðunum í deildini. Frá fyrsta bríksli tóktust tað púrasta greitt, at hetta var ein dystur, sum heimaliðið vildi vinna. Teir arbeiddu knallhart á miðvøllinum, har Símun Joensen og Marek Wierzbicki fingu fatur á nógvum. Verjan riggaði væl við Eyðun og Harley á bakkunum, meðan Ove og Jan tóku sær av framherjunum hjá Skála. Og serliga tóktist liggja væl fyri at spæla upp í vinstru, har kviki Heðin á Lakjuni royndi seg við nøkrum góðum renningum í fyrra hálvleiki.

Tað gav eisini einstakar møguleikar, men veruligar opnar kjansir gjørdist talan ikki um. Eina mest tí seinasta innleggið aloftast var óneyvt. Eitt nú varð bólturin í einum trimum førum skotin av baklinjuni og í føvningin á málverjanum hjá Skála.

## Fáir kontra-møguleikar

Skála sýndi hinvegin ikki so øgiliga nógv av tí spælinum, sum hevur ført teir heilt upp á tindin í ár. Press-spælið á miðvøllinum var ikki so eyðsýnt, sum tað plagar at vera. Kanska var Pauli nakað darvaður av skaðanum í lærkrikanum, sum hann hevur drigist við í ár, og í øllum førum var hansara leiklutur væl meira kontrollerandi, enn hann var

